H71-Kyndil 27-36(12-14)

# Halda fast í silvurplássinum

**Kyndil tykist nú hava tryggjað sær silvurið, eftir at teir sunnudagin vunnu greitt á hoyvíkingum í einum rættuliga rótutum dysti**

ATLANTIC AIRWAYS KAPPINGIN
*Terji Nielsen*
*terji@sosialurin.fo*



*Hans Arni Thomsen og Kyndil høvdu gott tak á Esbern Patursson og H71 sunnudagin*
*Mynd: Álvur Haraldsen*

Tað er ikki so langt síðani, at sagt varð, at Kyndil hevði eitt kompleks av hoyvíkingum, men hesum kompleksi tykjast teir nú hava vunnið á. Seinastu ferðirnir, ið liðini hava hitst, hava teir grønu nevnliga vunnið greitt.

### Breiddin sigraði

Dysturin sunnudagin í Hoyvíkshøllini var eitt gott dømi um, hvussu stór breiddin á Kyndlaliðnum í veruleikanum er. Í mun til fleiri av hinum liðunum er tað ofta so hjá Kyndil, eins og hjá t.d. VÍF, at málini eru rættiliga javnt býtt millum fleiri spælarar.

Hjá hoyvíkingum er úrslitið sum oftast rættuliga nógv tengt at, hvussu tað gongur hjá serliga liðskiparanum Halgir Dahl Olesen og kanska eisini Piti Negru. Sunnudagin vóru kyndilsmenninir rættuliga væl upplagdir, og tað vísti seg eisini, at hóast útskiftingarnar vóru títtar hjá Kyndli, so sást tað ikki aftur úti á vøllinum, tí breiddin var so mikið stór.

### Góður endaspurtur

Leingi sá tað út til, at tað fór at gerast ein javnur og spennandi dystur millum H71 og Kyndil. Gestirnir fingu betru byrjanina upp á dystin, men tað gekk ikki long tíð, áðrenn hoyvíkingar svaraðu aftur og komu upp á javnt.

Í fyrra hálvleiki var lítil munur á liðunum báðum, men móti endanum av hálvleikinum fekk Kyndil lagt seg tvey mál fram um hoyvíkingar.

Eftir steðgin setti Kyndil ferð á, og teir øktu um leiðsluna hjá sær. Seinni hálvleikur var einans átta minuttir gamal, tá ið gestirnir høvdu lagt seg á odda við fimm málum, 21-16, og tey flestu hildu óivað, at nú var avgjørt.

Men so var ikki, tí hoyvíkingarnir stríddust manniliga fyri at fáa fatur á Kyndil aftur, og tað var eisini um reppið, at tað eydnaðist teimum. Munurin millum liðini minkaði aftur støðugt, og tá ið einans tíggju minutttir vóru eftir at dystinum, vóru einans tvey mál á muni.

So søgdu kyndilsmenninir, at nú var nóg mikið, og við einum øgiligum endaspurti syrgdu teir fyri, at teir vunnu ein trivaligan sigur á H71. Seinastu tíggju minuttirnar skoraðu tær grønu ikki færri tíggju ferðir, meðan hoyvíkingarnir einans fingu trý mál, so endaliga úrslitið gjørdist 36-27 til Kyndil.

### Silvurið fer ongan veg

Við sigrinum syrgdi Kyndil fyri, at teir framvegis sita trygt á silvurplássinum. Komandi vikuskifti fær havnarliðið vitjan av nýklaktu føroyameistarunum úr Vestmanna, og tá verður spennandi at síggja, hvussu leikur fer.

Dystirnir millum Kyndil og VÍF eru altíð nakað heilt serligt, og tað er lítið at ivas í, at hóast vestmenningar longu eru meistarar, so fara teir at gera alt teir megna fyri at vinna á havnarmonnunum.

Kyndil tykist nú verða komið fyri seg eftir eitt longri tíðarskeið, har als einki bar til hjá teimum. Teir taptu tilsamans fimm dystir á rað í lands- og steypakapping, og tað var í hesum tíðarskeiði, at teir mistu sambandið við VÍF.

H71 hevur ikki staðið seg so væl í seinastuni. Tað tykist sum um, at hoyvíkingarnir langt síðani hava avskrivað hetta kappingarárið sum eitt ár, ið bara skal koyrast í gloymibókina. Vónirnar hjá hoyvíkingum undan kappingarárinum vóru góðar, men liðið hevur fingið sera lítið burtur úr í seinnu hálvu av kappingini.

**H71-Kyndil 27-36(12-14)**

**H71:** Esbern Patursson 6(1), Piti Negru 4, Halgir Dahl Olesen 4, Johnny Durhuus 4, Niels Viggo Niclasen 4, Olaf Vesturgarð 2, Christian Eli Zach-ariassen 2, Sigtór Andreasen 1

**Kyndil:** Finnur Hansson 8, Hans Áki Dal-Christiansen 7(1), Jakob Jónsson 6, Janus Einar Sørensen 4, Høgni Klein 4(1), Rókur Akralíð 3, Hjalti M. Jacobsen 1, Jósef Abrahamsen 1, Hans A. Thomsen 1, Ragnar Stakksund 1

**Brotskøst:** H71 1(1), Kyndil 3(2)

**Útvísingar:** H71 2, Kyndil 4

*Dómarar: Sámal Hansen og Kristian Johansen*

Stjørnan-Søljan 33-23(15-6)

# Stjørnan vísti sín klassa

**Oddaliðið Stjørnan vísti sunnudagin, at tað er eitt sindur á muni millum tey bæði fremstu liðini í Sunset-kappingini og so nærmastu kappingarneytarnar**

SUNSET-KAPPINGIN
*Terji Nielsen*
*terji@sosialurin.fo*

Hóast onkur kanska hevði væntað, at Søljan kundi hótta Stjørnuna í Klaksvík sunnudagin, so var ongantíð nakar ivi um, hvat var betra liðið.

### Gjørdu bart beinanvegin

Heimaliðið tóktist ógvuliga uppsettar til dystin, og tær vístu eisini sín klassa beinanvegin. Stjørnan legði fyri sum eitt óløgi, og longu tá ið 10 minuttir vóru leiktir, tóktist dysturin avgjørdur, tí tá hevði heimaliðið lagt seg á odda 7-1.

Bronsukandidatarnir úr Vágum fingu ongantíð fótin fyri seg, og tær vóru snøgt sagt runnar um koll í fyrra hálvleiki. Heimaliðið var flúgvandi, og tær bara øktu um leiðsluna hjá sær.

Neyðars Kristina í málinum hjá Søljuni kundi bara standa og hyggja at, meðan bóltarnir flugu um oyruni á henni, og tað var ikki eitt mál ov lítið, at Stjørnan var á odda heili 15-6 í steðginum.

Í seinna hálvleiki skifti venjarin hjá Stjørnuni, Svein Rógvi Nielsen, eitt sindur út á liðnum hjá sær, og hetta gav Søljuni neyðuga andaholið til, at tær komu eitt sindur fyri seg.

Nú meganði Søljan at spæla upp við heimaliðið, og tí gjørdist munurin á liðunum báðum ikki so stórur, sum kanska var væntandi, tá ið farið var til hálvleiks. Seinni hálvleikur var rættuliga javnur, og liðini skiftust um at skora.

Tá ið avtornaði, vísti tað seg, at Stjørnan hevði vunnið við tíggju málum, 33-23, og tað var ikki eitt mál ov lítið. Greiði sigurin hjá oddaliðnum Stjørnuni á bronsukandiatunum úr Søljuni sigur kanska eisini eitt sindur um, hvussu stórur munurin á teimum báðum fremstu liðunum og so teimum liðunum, ið liggja á teimum næstu plássunum, í veruleikanum er.

**Stjørnan-Søljan 33-23(15-6)**

**Stjørnan:** Katarina Stjepanov 8(2), Bára S. Klakstein 6, Annika Ljósstein 6(3), Joan M. Djordjevic 4, Alina Olaru 3, Anna Kristina Samson 3, Louisa Andreasen 1(1), Maria við Neyst 1(1), Una Olsen 1

**Søljan:** Nicoleta Radu Hansen 7, Heidi Maria Akselsen 5(5), Lina Andriulyte 4, Hertha Jónsdóttir Simonsen 4, Fía Selma Nielsen 2, Kristianna Petersen 1

**Brotskøst:** Stjørnan 8(7), Søljan 7(5),

**Útvísingar:** Stjørnan 4, Søljan 8

**Dómarar:** Brandur Johansen og Heri Petersen